VEÐRIÐ

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið



Veðrið í dag:
Fleyr til gul av norði og útnyrðingi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 11 og 14 stig.



Veðrið leygardagin:
Fleyr til gul av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørkaflókar. Hitin millum 12 og 15 stig.



Veðrið sunnudagin:
Andøvsgul upp í ein strúk av eystri og eitt skifti regn. Hitin millum 11 og 14 stig.

Veðrið mánadagin og týsdagin:
Lot til andøvsgul av útsynningi og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 10 og 14 stig.

Kika eftir Risanum

Eiðis Kommuna hevur við stuðuli frá ferðavinnuni í Eysturoy og Ferðaráð Føroya sett ein kikara upp norðan fyri bygdina á Eiði, har fólk nú kunnu kika eftir eitt nú Risanum og Kellingini og Slættaratindi

FERÐAVINNA
Edvard Joensen

Eiði: Tað situr ein havhestur á økslini á Kellingini. Hann situr einsamallur og tykist hava gott pláss. Nógvir eru á Risanum, og upp aftur fleiri í berginum í Eiðiskolli. Tríggir seyðir eru at síggja í Kollslíð, og nógvar ritur sita uttan fyri Heimastu Gjógv í Ritaskorunum.

Alt hetta og nógv annað ber til at síggja í nýggja kikaranum, sum Eiðis Kommuna hevur sett upp undir Svannisbrekku niðast á Niðaru Fitjum nakað norðan fyri Loranstøðina.

Vendir tú so kikaranum á, ber til at eygleiða Slættaratind og økið har rundan um.

Tordur Niclasen, borgarstjóri á Eiði, sigur, at kommunan hevur sett kikaran upp sum lið í átakinum at menna ferðavinnuna innan fyri kommunumark.

Økið rundan um, har kikarin stendur, er fylt upp við skervi. Ein krógv er laðað upp aftur beint við, og sanniliga um ikki eisini torv er í henni. Til at halda økið reint, er ruskspan sett upp beint við kikararn.

Men tað lýtti tó almikið, tá Sosialurin vitjaði staðið, at órudd rakst í ánni, sum rennu beint við. Gamalt hegn, timbur og pappír, sum ikki eigur at vera har. Ivaleyst hava eisini onnur ferðafólk, sum hava vitjað staðið, lagt merki til tað.

Tordur Niclasen, borgarstjóri, upplýsir, at tað kostar umleið 30.000,- krónur at seta kikaran upp og gera økið rundanum.

Eiðis Kommuna hevur staðið fyri arbeiðinum, men hevur fingið sera góðan fíggjarligan stuðul frá ferðavinnuni í Eysturoy og frá Ferðaráði Føroya, sigur borgarstjórin.

Hitalagið kring knøttin

Illulisat	7
Nuuk	5
Qaqortoq	13
Ammassalik	12
Saint John's	23
Halifax	17
Reykjavík	11
Seyðisfjørður	8
Tórshavn	12
Lerwick	15
Aberdeen	19
London	24
Tromsø	11
Bergen	23
Oslo	–
Stokkhólm	22
Keypmannah.	22
Helsinki	22
Moskva	18
Berlin	22
Warzawa	24
Kiev	19
Bukarest	23
Paris	24
Madrid	29
Róm	25
Malorca	27
Athen	29
Malta	28
Tunis	30
Beijing	22
New Dehli	35
Bangkok	33
Jakarta	32
Sydney	17
New York	25
Miami	29
Los Angeles	22
Meksikobýur	21
Panama	33
La Paz	12
Rio de Janeiro	–
Buenos Aires	13

LUFTTRÝSTIÐ



Eitt lágtrýst, 1008 hPa millum Íslands og Føroya fer norðureftir. Eitt annað lágtrýst, 1014 hPa við Aberdeen fer eisini norðureftir, men dýpist.

Lágtrýstið eystan fyri Føroyar fer spakuliga norðureftir og brúgvalagið haðani hvørvur eystureftir.

HITALAGIÐ



Hitalagið mált frá 07/08 kl. 06⁰⁰– 08/08 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 11,9°
Minsti hiti máldur í aug.: 0,2° Mesti hiti máldur í aug.: 22,0°

AVFALLIÐ



Avfallið: 5,3 mm – mált frá 07/08 kl. 06⁰⁰– 08/08 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í august: 12,0 mm

TURRIKLÆÐI
HÚGVUR
T-SHIRT
KEPPAR
og FLØGG

12. MAÐUR
Tlf. 213212

VESTFALLSKYRRINDI

8. aug.: Tendring
10. aug.: Mánin næstur jørðini
15. aug.: Fyrra kvarter

Kelda: Almanakkin 2002

Dagur	Suðuroyar-/Vágafirði fp.	Suðuroyar-/Vágafirði sp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði fp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði sp.	Hestfirði/Sundalagnum fp.	Hestfirði/Sundalagnum sp.	Vestmannasundi fp.	Vestmannasundi sp.	Mykinesfirði fp.	Mykinesfirði sp.	Nólsoyarfirði fp.	Nólsoyarfirði sp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi sp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi fp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi sp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði sp.	Hvannasundi fp.	Hvannasundi sp.	Fugloyarfirði fp.	Fugloyarfirði sp.
9. aug	07.53	20.19	06.53	19.19	07.08	19.34	09.53	22.19	10.53	23.19	06.08	18.34	05.08	17.34	08.08	20.34	09.08	21.34	07.38	20.04	08.53	21.19
10. aug	08.43	21.07	07.43	20.07	07.58	20.22	10.43	23.07	11.43	—	06.58	19.22	05.58	18.22	08.58	21.22	09.58	22.22	08.28	20.52	09.43	22.07
11. aug	09.32	21.57	08.32	20.57	08.47	21.12	11.32	23.57	00.07	12.32	07.47	20.12	06.47	19.12	09.47	22.12	10.47	23.12	09.17	21.42	10.32	22.57
12. aug	10.21	22.45	09.21	21.45	09.36	22.00	—	12.21	00.57	13.21	08.36	21.00	07.36	20.00	10.36	23.00	11.36	—	10.06	22.30	11.21	23.45

5 707265 100050 >